**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Ingibjørn Royðutoft. Sunnudagin kl. 17, Møti við Arna Abrahamsen. Sangur við Ecclesia.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Evni: Dómarin Samson. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ stýrinum.
Sunnudagin kl. 20 Møti v/ Hera Trøndheim. Evni: Einglar. Kórið í Rituvík syngur (barnaansing).

**Eydnan á Oyrarbakka**
**Møti í Eydnuni á Oyrarbakka.**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Jan Joensen og Palli Højgård tala, Jonna Højgård og fleiri syngja. Øll eru vælkomin til møti. Vit minna á útifundin í Vestmanna leygarkvøldið kl. 20.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Evangeliskt møti verður leygarkvøldið 17/5 kl 20, Palli Højgaard talar, biðið verður fyri sjúkum.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti - Glyvrapraise.
Sunnudagur kl. 17 Familjumøti. Drekka aftaná.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Susanne & Leif Madsen, trúboðarar í Kenya.
Leygardagin kl. 10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 18.00 er møti v/ Eivinn Bringsberg.
Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 møti.
Mánakvøldið 19. mai møti v/ Susanne og Leif Madsen. trúboðarar í Kenya.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin 18. mai kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Jóhannes Jóhannessen.
Streingjakórið syngur saman við barnakórinum.
Ein gentubólkur luttekur eisini.
Innsavnan til Útimissión.
kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur. Kl. 18 møti v/ Jógvan Lamhauge. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnukvøldið 18. mai møti kl. 18.00, Símun Jacbsen prestur talar.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 18. mai verður farið niðan á Fjallið, Hvalvík. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er lættur til miðal tungur, og gingið verður uml. 3 tímar. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður niðan á Sneis (Streymoy) sunnudagin 18. mai. Vit møtast við SHELLstøðina í Vestmanna klokkan 14.

**Bátafelagið á Bakka ger útferð**
Bátafelagið á Bakka ger útferð inn í Skálafjørð leygardagin 17. mei.
Bátarnir samlast uttanfyri Bakkakajina á Glyvrum kl 13.00 og sigla inn í bátahylin í Skálafirði, har teir verða frammi uml. kl. 14.30
Tiltakið er alment og skulu luttakararnir sjálvi hava mat og drekka við.
Skipað verður fyri felagssangi í teltinum. Grillir verða settar upp so møguleiki er at grilla. Nakrir bátar koma at liggja á økinum og kunnu børn og vaksin rógva sær ein túr. Lutaseðlar verða seldir.
Øll eru vælkomin, bæði til bátaferðina og tiltakið í Skálafirði.
Tiltakið er ókeypis og er tekning ikki neyðug.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur:tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Fríggjadagur***
10.00 - 17.00 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Vágs Pensjónistafelag**
ger útferð til norðoyggjar 13.-15. juni um nóg nógvir limir tekna seg. Tekning áðrenn 7. juni á tlf. 373261 ella 373320 (Judith).

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit hava summarsteðg.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofiu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur:
heilaf@post.olivant.fo

**Kunningarstovan, Felagið Tórshavn**
Vaglið 4, Postboks 379, 110 Tórshavn.
tlf. 302425
torsinfo@torshavn.foa
www.visittorshavn.fo
Opið er má-fr kl. 11-17, ley kl. 10-13.

**Sandoyar Kunningarstova**
Mørkin Mikla 3kj
FO - 210 Sandur
Tel. 361836, fax 361256
www.visitsandoy.fo
sandinfo@post.olivant.fo
Opið er:
summar: 1. apríl – 31. aug. kl. 9-12 & 13-16.
Vetur: 1. sept. – 31. mars kl. 13-16.

**Listasavnið á Sandi nú opið gerandisdagar**
Við tað at summarið er í nánd, so er Listasavnið nú opið aftur týsdag - sunnudag kl. 14-16. Tó er tað stongt mánadag. Listasavnið á Sandi er sanniliga vert eina vitjan.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum**
hevur hesi telefon nr.:
form. 313484 - 219584
næstform. 421092 - 281179
nevndarl. 319588 - 212839.

**Prógv**
Hósdagin 8. mai fekk Olevina Sundsskarð prógv sum konditari á EUC Ringsted. Fyri avrikið fær hon eitt bronsu heiðursmerkið.

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 28. mai verða tvíburðarnir Kristoffur Matras, Norðoyri og Julianna Matras á Hálvmørk, Toftir, 60 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum í Klaksvík fríggjadagin 30. mai kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 456570 ella 287578 í seinasta lagi tann 18. mai.

**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 10. juni verða tvíburðarnir Ruth Thomassen, Tórshavn og Agnar Petersen, Argir, ættað úr Kaldbak, 60 ár. Føðingardagin halda tey saman í Pálsstovu fríggjadagin 13. juni kl. 19.00. Tey, sum ynskja at halda dagin saman við okkum vera vinarligast biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juni hjá Ruth tlf. 314309 ella Agnar tlf. 318460.

**85 ár**
Fríggjadagin 16. mai verður Andrea Hansen, Fuglafjørður, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**90 ára føðingardagur**
16. mai verður Petur Højgaard í Saltangará 90 ár. Móttøka verður í Sjókafe'ini kl. 18-22.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin tann 18. mai verður Andrias Høgnason Eriksen, sonur Randi Restorff Jacobsen og Høgna Eriksen fermdur í Sct. Jacobi kirkju. Bústaður: Navervej 7, 6800 Varde, Danmark.

**Brúdleyp**
Leygardagin 17. mai kl. 14:00 giftast í Betesda, Klaksvík, Fríða Jákupsdóttir, Tórshavn og Martin Sivertsen, Klaksvík.
Drekkamuður verður í Betesda aftaná vígsluna. Veitsla verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 17. mai giftast Judith Schwartson og Mortan Johannesen úr Havn. Brúðarvígslan verður í Ebenezer kl. 14. Veitsla verður fyri innbodnum í Oasuni í Hoyvík kl. 19.



Leygardagin 17. mai giftast í Catholic Parish, Sibalom Antique, Sigmund Bech, Porkeri og Rowena Jungco Nupital. Br.adr.: Violeta Jungco c/o Cosenjo Orbino, Terjares Subdivision, San Angel, San Jose Antique, Philippins. mail: sigmund.bech@hotmail.com



Leygardagin 17. mai kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Alvilda Brøðraberg og Jógvan Lützen. Veitslan verður í fyri innboðin HB-húsinum kl.19.